bústaðir
Føroya bústaðarfelag

# Serligar húsreglur fyri lestrarbústaðin

# Studentaskúlaheimið í Berjabrekku

## Alment

Hesar húsreglur eru tær serligu húsreglurnar, sum eru galdandi fyri lestrarbústaðin Studentaskúlaheimið í Berjabrekku, og sum leigararnir skulu fylgja. Leigararnir hava eisini ábyrgd av, at gestir teirra halda húsreglurnar.

## § 1 Reingerð

Allir leigarar á Studentaskúlaheiminum hava felags ábyrgd av, at reint og ruddiligt er í tí húsinum, har teir búgva.

Leigararnir skulu sjálvir halda síni kømur og baðirúm rein.

Í einstaka húsinum er ein skrivað reingerðarskipan fyri felagsøkini, ið skal fylgjast.

Hvør einstakur leigari hevur skyldu at taka upp eftir sær í gongdunum og felagsrúmum. Túnið rundan um Studentaskúlaheimið skal haldast reint og ruddiligt. Møguligt órudd, so sum fløskur og pappír, skal takst upp og beinast burtur. Um leigari er orsøk til, at felagsøkir uttandura ella innandura gerast óruddilig ella skitin, skal viðkomandi sjálvur skipa fyri at rudda og vaska eftir sær, ella skipar Bústaðir fyri, at tað verður gjørt fyri leigarans rokning.

## § 2 Rudda upp eftir sær í køkinum

Farast skal væl um køkin. Leigararnir skulu halda køkin reinan og ruddiligan. Øll rudda upp eftir sær. Ansast skal væl eftir el-lutum (komfýri, køliskápi, kókiketli, strúkijarni o.ø.).

## § 3 Rusk

Húsarhaldsrusk skal koyrast í posar í ruskbingjurnar, sum eru til tað endamálið. Tey, sum leiga, hava sjálvi ábyrgd av at beina fyri vandamiklum burturkasti, so sum glasi, battaríum og øðrum. Tað er ikki loyvt at seta rusk ella annað órudd í trappugongd, felags inngongd ella felagsøki. Sigarettstubbar og líknandi skulu beinast burtur og mugu ikki tveitast á felagsøkið.

## § 4 Súkklur, barnavognar og annað

Súkklur, barnavognar og annað tílíkt skulu standa inni á egnum øki ella øki, sum er ætlað til tað, og mugu av trygdarávum undir ongum umstøðum setast í trappur, á gangin ella á onnur felagsøkir og mugu ikki vera til ampa fyri aðrar leigarar.

## § 5 Akfør og parkering

Bilar og onnur motorakfør eiga at parkerast, har pláss er gjørt til tað og soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri onnur. Tað er ikki loyvt at parkera framman fyri felags inngongdum ella ruskbingjum. Tó er av- og áskipan loyvd.

Bilar uttan nummarspjøldur, húsvognar og líknandi skulu ikki setast á parkeringsøkið.

## § 6 Tónleikur og larmur

Fyri at hava so gott grannalag sum til ber, eiga leigararnir til eina og hvørja tíð at vera hampilig yvir fyri hvørjum øðrum. Náttarfriðurin skal virðast. Hetta merkir, at friður er millum kl. 22 og kl. 7, og tá er til dømis ikki loyvt at nýta larmandi amboð ella at spæla harðan tónleik uttan so, at tað er avtalað við grannarnar frammanundan. Tað er heldur ikki loyvt at syngja, spæla tónleik ella halda gang uttandura við studentaskúlaheimið, tá friður skal vera.

Trappurúmini eru ikki til spæl, renning ella larm. Har skal ikki vera óneyðugur gangur.

Ikki er loyvt at órógva grannalagið. Hetta sambært viðtøkunum hjá Eigarafelagnum í Berjabrekku, sum Studentaskúlaheimið er partur av.

Um tónleikur skal spælast ella veitslur skulu haldast, kann tað bert vera gjørt fríggjakvøld og leygarkvøld ella kvøld upp móti frí- og halgidøgum við afturlatnum hurðum og vindeygum. Óljóð, sum kann forstýra aðrar leigarar, skal als ikki vera aftaná midnátt. Um ein leigari sigur frá, at tað verður larmað ov illa, skal tað virðast beinan vegin.

Legg til merkis, at tú, sum leigari, hevur ábyrgdina av, at tað ikki verður larmað í leigumálinum, eisini um tað eru gestir hjá tykkum ella onnur, sum tú gevur atgongd til leigumálið, sum larma.

## § 7 Veggjaprýði
Leigari hevur innanfyri rímuligt mark loyvi at prýða veggirnar í sínum kamari. Ansast skal eftir at hol, sum verða borað í veggirnar, ikki eru óneyðuga stór og grefflig (í mesta lagi kann brúkast ein 6-8 mm. borur). Leigarin rindar fyri umvælingar eftir hol í vegginum av sínum depositum.

Bústaðir setur navnaskelti á postkassar. Leigarin skal ikki seta skeltir ella annað upp á hurðar ella veggirnar uttanfyri kamarið.

## § 8 Royking
Tað er bannað er at roykja innandura.

## § 9 Húsdjór
Ikki er loyvt at hava húsdjór, og tað er heldur ikki loyvt at ansa djórum fyri onnur í leigumálinum. Djór, sum eigarin heldur í búrum og akvarium, roknast ikki sum húsdjór og eru loyvd, bert tey ikki eru til skaða fyri bygningin ella eru til ampa fyri aðrar leigarar. Ikki er loyvt at hava skriðdjór. Førarahundar eru tó altíð loyvdir.

## § 10 Vaskaríðið
Bert tey, sum búgva í leigumálinum, kunnu nýta vaskimaskinuna og turkitrumluna. Vegleiðingarnar, sum eru hongdar upp í vaskarínum, skulu altíð fylgjast. Tey, sum brúka vaskaríið, skulu altíð rudda væl upp eftir sær.

## § 11 Orkunýtsla
Leigararnir gjalda felags fyri orkunýtsluna. Ovurnýtsla ella beinleiðis misnýtsla av hitanum, el og heitum vatni er ikki loyvd. Tað er ikki er loyvt at seta upp eyka hvítvørur o.a., sum nýtir nógvan streym, uttan Bústaðir hevur givið serligt loyvi til tað. Felags køliskáp og frystiboks er í báðum húsunum.

## § 12 Endurgjald fyri brotnar lutir
Verður innbúgv o.a. í húsinum brotið ella illa viðfarið, hevur viðkomandi, ella tann, sum viðkomandi er gestur hjá, endurgjaldsskyldu. Um ikki annað kann avtalast, hefta leigararnir í felag fyri skaðar, sum eru gjørdir í felagshølum, har tað ikki ber til at ávísa, hvør hevur skyldina.

## § 13 Framleiga
Til einhvørja framleigu krevst skrivlig góðkenning frá Bústøðum.

Serligar treytir eru fyri framleigu. Um leigari ynskir at framleiga leigumálið í styttri ella longri tíð, skal tann, sum leigað verður til, uppfylla upptøkutreytirnar fyri at kunna leiga á Studentaskúlaheiminum og Bústaðir skal góðkenna framleiguavtaluna. Tað er undir ongum umstøðum loyvt at leigari fær fíggjarligan vinning av at framleiga. Tann, sum framleigar, kemur framvegis at hava alla løgfrøðiligu ábyrgdina av leigumálinum í tíðarskeiðinum, framleigað verður.

Tað er ikki loyvt at leiga ella framleiga kamarið á airbnb, boligportal.dk ella øðrum heimasíðum, har bústaðir verða leigaðir ella umbýttir.

Ikki loyvd útleigan ella framleiga er at fata sum ógvusligt brot á húsreglurnar, sum viðførir, at leiguavtalan verður slitin.

## § 14 Uppsøgn av leiguavtaluni
Uppsøgn kann vera gjørd, tá leigari ikki longur uppfyllir upptøkutreytirnar á Studentaskúlaheiminum ella tá leigari fleiri ferðir brýtur hesar húsreglur.

Allir leigarar eiga at vísa tol og virðing fyri øðrum leigarunum. Um ein leigari ella vitjandi ber seg hóttandi, ófantaliga ella harðliga at móti øðrum leigara, vitjandi ella móti umboði frá Bústøðum, kann hetta hava við sær, at leigumálið verður uppsagt alt fyri eitt.

## § 15 Slit av leiguavtaluni

Leiguavtalan verður slitin, um leigan ikki verður goldin rættstundis ella um leigari í ógvusligan mun brýtur húsreglurnar.

## § 16 Viðgerð av kærum

Leigararnir hava rætt til at kæra um atburðin hjá øðrum leigarum. Klagur skulu sendast skrivliga til Bústaðir. Um leigarin er ósamdur við Bústaðir um ymiskt í sambandi við leigumálið, ber til at kæra beinleiðið til Leigunevndina á heimasíðuni hjá Leigunevndini.

## § 17 Gildiskoma

Hesar húsreglur fyri Studentaskúlaheimið í Berjabrekku eru galdandi frá 1. januar 2018. Bústaðir tilskilar sær rætt til einsíðugt at broyta hesar húsreglur.

**Bústaðir – Føroya bústaðafelag, januar 2018**